# ft og
# ursson



*Tann 18. august 1906 boðaðu 13 av 22 tinglimum frá í Dimmalætting, at teir hava skipað seg í ein politiskan flokk á tingi, ið nevnir seg "sambandsmenn". Hesir vóru allir valdir á ting í 1906. Fr. fv. Niclas Djurhuus og Óli N. Skaalum. Aft. f. v. Johan C F. Dam og Jógvan Poulsen. Myndin er úr bókini "Sambandsflokkurin – upphav og virki"*



*Fríðrikur Petersen var fyrsti formaður í Sambandsflokkinum. Flokkurin varð stovnaður við tí høvuðsmáli at varðveita ríkisrættarligu bondini við Danmark. Stovnararnir mettu hesi viðurskifti vera hótt við m.ø. "tilboðnum", ið menninir, ið seinni stovnaðu Sjálvstýrisflokkin, ynsktu at fremja*

–Argumentini hjá teimum kunnu ikki brúkast í dag, og tað er tí at samfelagið er so nógv broytt.

Spurd, um sambandsmenn ikki høvdu tær stóru hugsjónirnar sigur høvundurin:

– Upp á ein máta vóru sambandsmenn meira realistiskir, meðan hinir – sjálvstýrismenninir – vóru droymararnir, men teir hava verið líka politiskt tilvitaðir, sigur Anja Andreassen.

## Tey sjálvstýrissinnaðu skrivað søguna

Hon hevur í bók síni valt at gera meira burtur úr tíðarskeiðnum fyri seinna heimskríggj, tí hesa tíðina heldur hon vera meira spennandi. Fyri kríggið fylti spurningurin um loysing ella samband meira, og eftir kríggið kom vinnulívspolitikkur at spæla ein størri leiklut í føroyskum politikki, sigur Anja Andreassen, ið hevur valt ikki at skriva so nógv um fólkaatkvøðuna í 1946 og heimastýrislógina frá 1948, tí hetta hava so nógv onnur skrivað um, heldur hon.

– Hetta er ein populerur partur av føroyskari søguskriving, sigur Anja Andreassen, sum er ein av teimum, ið metir, at fólk á sjálvstýrisveinginum í føroyskum politikki í ein stóran mun hava verið við til at skriva føroyska søgu. M.a. nevnir hon Hans Jacob Debes, sála, sum hon metir hevur gjørt eitt stórt arbeiði, men hann duldi ikki fyri, at hansara samhugi lá hjá sjálvstýrisveinginum, og tað er okey, men tað skal man bara vita, sum Anja Andreassen málber seg.

– Tað er ikki skrivað so lítið um hetta tíðarskeiðið, men alt er skrivað út frá vinklinum hjá teimum sjálvstýrissinnaðu, heldur Anja Andreassen, ið metir, at sambandsmenn higartil í føroyskari søguskriving eru lýstir sum teir afturhaldssinnaðu, og lítið er skrivað um, hvat teir vildu. Men sambært høvundanum vóru teir tjóðskaparmenn. T.d. var Andrass Samuelsen limur í Føringafelag, sigur Anja Andreassen, og sigur, at hon heldur ikki, at teir valdu eina aðra leið, sum onkur hevur róð framundir, men at teir hildu á við sínum, men "ræddust" Jóannes Patursson, ið ikki var so moderatur í sínum politisku hugsjónum.

## Bókin skal lýsa sambandsfólk

Um sjálva bókina sigur Anja Andreassen, at hon hevur valt at skriva hana soleiðis, at tað eru sambandsfólk og teirra hugsjónir, sum koma fram, og sjálv væntar hon, at hetta kann blíva eitt av kritikkpunktunum, sum bókin fer at fáa.

Men Anja Andreassen sigur, at hon hevur valt ikki at samanlíka sambandsfólk við aðrar politiskar flokkar ella at samanlíkna Føroyar við onnur hjálond. Hon hevur heldur ikki valt at gera nakrar analysur sum so, um hvat var rætt og skeivt, og tí nertir bókin ikki so nógv við, hvat eitt nú Jóannes Patursson helt um einstøk mál, ella hvørji argument mótstøðufólk hjá sambandsfólki bóru fram um ymisk mál gjøgnum tíðirnar. Tí er bókin meira eitt heiðursrit enn ein vísindalig bók, heldur Anja Andreassen.

Bókin er tó sum nevnt skrivað av einum søgufrøðingi og tí eru metodurnar, ið slíkir plaga at brúka, eisini nýttar í hesi bók.

Tað hevur tó ikki verið so lætt at funnið keldur frá tíðini fyri kríggið, tí ongar gerðabøkur eru frá hesi tíðini. Hildið verður, at tær munnu hava ligið inni í húsunum hjá Dimmalætting, sum brendu í 40'unum. Hinvegin var Dimmalætting málgagnið hjá Sambandsflokkinum, og tí ber til at lesa ein stóran part av tí, ið sambandsmenn skrivaðu hesa tíðina, í Dimmalætting, sum tí er høvuðskeldan til ta nýggju bókina.

Í eini samrøðu við Danmarks Radio stutt eftir kríggið sigur Andrass Samuelsen, at flokkurin varð stovnaður á ólavsøku í 1906. Stevnuskráin hjá flokkinum varð prentað í Dimmalætting 18. august 1906, og tí hevur fyrireikingararbeiðið sjálvandi verið gjørt áðrenn hon varð prentað í Dimmalætting

18. august er tí valdur sum útgávudagur til bókina "Sambandsflokkurin 100 ár".

Tá Sambandsflokkurin fylti 90 fyri 10 árum síðani læt flokkurin prenta heiðursritið "Sambandsflokkurin – upphav og virki", sum Pól á Kletti savnaði og legði til rættis.